Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

**Dagførd 20. desember 2021**

## FRÁGREIÐING UM GJØGNUMSKYGNI SAMBÆRT § 25 Í GRANNSKOÐARALÓGINI FYRI 2020/21

Sambært grein 25 í grannskoðaralógini skulu grannskoðarafyritøkur, ið geva grannskoðanarátekning á ársfrásagnir hjá løgfrøðisligum eindum av serligum almennum áhuga, almannakunngera eina serliga frágreiðing um gjøgnumskygni:

### 1. Løgfrøðislig skipan og ognarviðurskifti

P/F Januar løggilt grannskoðanarvirki er skipað sum eitt partafelag. Grannskoðarar, ið eru løggildir eftir grannskoðaralógini ella feløg, ið hesir eiga allan partapeningin í, eiga 75,0% av partapeninginum í P/F Januar. Tey seinastu 25,0% eiga skrásettir grannskoðarar, grannskoðarar við aðrari góðkenning, ella grannskoðarar við hægri útbúgving. Allir partaeigararnir starvast í fyritøkuni.

### 2. Lýsing av leiðsluskipan

Leiðslan í P/F Januar er samansett av stjórn og nevnd. Í stjórnini er

- Jógvan Amonsson, statsaut. revisor
- Hans Laksá, statsaut. revisor

Um fleiri stjórar eru í felagnum, eru teir síðusettir og taka lut í dagligu leiðsluni í felagnum og starvast í P/F Januar sum grannskoðarar, umframt at virka sum stjórar.

Nevndin er samansett av

- Heini Thomsen, statsaut. revisor
- Fróði Sivertsen, statsaut. revisor
- Christina á Bøgarði, statsaut. revisor
- Jóhan Martin Jacobsen, KT-grannskoðari, CISA, CRISC
- Jógvan Joensen, cand.merc.aud.

Um tað stendur á jøvnum í atkvøðugreiðslu í nevndini er formansins atkvøða avgerandi.

Á ársaðalfundi felagsins atkvøða partaeigararnir og gera soleiðis sína ávirkan á felagið galdandi. Hendan ávirkanin er at velja stjórar og grannskoðara, samtykkja viðtøkur og at góðkenna ársfrásøgnina. Innanhýsis viðurskiftini millum partaeigararnar eru ásett í einum partaeigarasáttmála.

### 3. Lýsing av netverki og rættarligum og skipanarligum avtalum við netverkið

P/F Januar er limur í RevisorGruppenDanmark, ið er eitt netverk fyri statsautoriseraðar grannskoðarafyritøkur í Danmark, Grønlandi og Føroyum.

RevisorGruppen Danmark umfatar 25 statsautoriseraðar grannskoðarafyritøkur í Danmark, Grønlandi og í Føroyum, sum hava 70 skrivstovur. Tilsamans starvast umleið 1.500 fólk í netverkinum, ið løgfrøðiliga er stovnað sum ein keypsfelagsskapur.

Hendan skipan inniber, at teir einstøku limirnir í RevisorGruppenDanmark eru sjálvstøðugar løgfrøðiligar eindir, ið hvørki hefta hvør fyri øðrum ella ábyrgjast fyri arbeiðið hvør hjá øðrum. Á skrivstovuni hjá RGD starvast 11 fólk, umframt serligar deildir fyri KT-grannskoðan og skattaráðgeving vm.

RevisorGruppenDanmark tekur sær av uppgávum, ið praktiskt kunnu loysast í felag. Hesar eru millum annað:

- Innanhýsis góðskueftirlit har felagsskrivstovan árliga ger eftirfylgjandi góðskueftirlit hjá hvørjum einstøkum statsautoriseraða grannskoðara.
- Stendur fyri at útbúgva og eftirútbúgva samstarvsfólkini á øllum stigum í limavirkjunum.
- Mennir og viðlíkaheldur skipanir og amboð til nýtslu í grannskoðan, gjøgnumgongd og øðrum arbeiði í limavirkjunum.
- Mennir og dagførir standardskipanir til ársfrásagnir og annað.
- Kunningartilfar til nýtslu hjá kundum og samstarvsfólki.

Í RevisorGruppenDanmark er ein nevnd og ein stjórn, ið hava evstu ábyrgdina. Nevndin verður vald á árliga ársaðalfundinum, har hvørt limafelag hevur eina atkvøðu.

### 4. Grundarlagið undir samsýning hjá partnarunum

P/F Januar hevur 9 partnarar, har meirilutin er partur av dagligu ella ovastu leiðsluni. Partnararnir vera løntir partvís í mun til tað arbeiðsorku og partvíst við vinningsbýti í mun til ognarlut. Samsýningin, svarandi til úrslitið, eftir at allir kostnaðir herundir, løn til onnur starvsfólk er goldin. Vinningsbýti verður samtykt á aðalfundi.

### 5. Lýsing av innanhýsis góðskustýringsskipanini, herundir tilskilan av politikki fyri óheftni og eftirútbúgving.

P/F Januar skal, eins og allar aðrar grannskoðarafyritøkur, lúka ásetingar í lóggávu, siðsemisreglum og altjóða grannskoðanarstandardum. Leiðslan hevur ábyrgdina av, at tað til eina og hvørja tíð finnast dagførdar góðskustýringsskipanir, og at hesar skipanir altíð verða fylgdar, tá arbeiðsuppgávur verða loystar.

Tann einstaki partnarin hevur ábyrgdina av at nýta góðskustýringsskipanina, og at øll samstarvsfólkini á grannskoðarafyritøkuni hava ábyrgdina av at kunna um staðfestar feilir og veikleikar í góðskustýringsskipanini, um tey verða varug við slíkar.

Øll góðskustýringsskipanin verður gjøgnumgingin og eftirmett einaferð árliga í samstarvi við RevisorGruppen Danmark.

Við leiðbeiningum og eftirliti heilt frá planlegging til niðurstøðu eftirhyggja partnararnir og tey royndu samstarvsfólkini, at uppgávan verður loyst samsvarandi teimum fastløgdu krøvum og standardum.

Hvørt ár verður eitt tal av uppgávum gjøgnumgingin fyri at tryggja, at góðskuskipanin verður fylgd, og at tann givna váttanin er røtt. Triðja hvørt ár gjøgnumgongur almenna grannskoðaraeftirlitið gjørda arbeiðið á sama hátt.

Fyri allar uppgávur fyri kundar við serligum almennum áhuga , skal skjalprógvanin gjøgnumgangast av øðrum partnara til at tryggja, at allar týðandi niðurstøður eru grundaðar á nøktandi grannskoðanarprógv.

P/F Januar krevur, at tað skal kunna skjalprógvast, at lógir, etiskar reglur og innanhýsis ásetingar um óheftni altíð verða fylgdar. Hendan skjalprógvanin verður gjøgnumgingin sum ein liður í eftirfylgjandi góðskueftirliti. Umframt skjalprógv um óheftni viðvíkjandi einstøku uppgávuni, vátta øll samstarvsfólk einaferð árliga, at tey hava kunnleika til og yvirhalda reglurnar um tagnarskyldu og óheftni.

Vit hava eyguni eftir, at ásetingarnar um at ábyrgdarhavandi partnarar skulu skiftast út 7. hvørt ár, tá talan er um fyritøkur við serligur almennum áhuga, altíð verða hildnar. Harumframt verður tað tryggjað við atgongd til dátugrunn í RevisorGruppen Danmark, at reglurnar um óheftni verða hildnar, eisini tá onkur annar limur í netverkinum stendur viðkomandi kunda ov nær.

Øll starvsfólk í P/F Januar luttaka regluliga í undirvísing og eftirútbúgving. Fyri grannskoðarar við almennari góðkenning verður tað tryggjað, at hesar altíð yvirhalda krøv lógarinnar til eftirútbúgving. Hetta krav er 120 tímar yvir 3 ár. Harafturat skulu KT-grannskoðarar og grannskoðarar, ið grannskoða tryggingarfeløg og peningastovnar, hava 60 tímar eyka í eftirútbúgving á hesum serstøku økjunum.

## 6. Nær seinasta góðskueftirlit varð á virkinum

P/F Januar hevði eitt alment góðskueftirlit í september 2019, har alment áhugverdir kundar vórðu kannaðir (§19, stk. 3 – kundar), sum fólk frá danska Erhvervsstyrelsen gjørdu. Endaliga niðurstøðan frá Grannskoðaraeftirlitinum er: "JANUAR generelt har etableret, implementeret og anvendt et hensigtsmæssigt kvalitetsstyringssystem". Granskoðaraeftirlitið hevur onkra átalu, sum tó ikki fáa aðrar avleiðingar.

Netverksgrundað góðskueftirlit, ið góðskueftirlitsfólk frá RevisorGruppen Danmark hava gjørt, varð seinast gjørt í oktober 2020. Í endaligu niðurstøðuni stendur: "Det er vores konklusion, at det interne kvalitetsstyringssystem er tilfredsstillende udformet og implementeret. Vi har ikke forslag til

opdateringer." Vivíkjandi sakargjøgnumgongdini er niðurstøðan henda: "I alt har vi i 2020/21 kontrolleret 4 sager inden for revision. Kontrollen har udløst anbefalinger til forbedringer, forenklinger og bedre systemanvendelse uden betydning for kvaliteten af det samlede produkt.
Herudover har vi i den ene sag konstateret, at der er væsentlige fejl og mangler i sagsløsningerne. "

## 7. Váttan frá ábyrgdarhavandi leiðslu í grannskoðaravirkinum um, at góðskueftirlitið virkar á fullgóðan hátt, og at óheftnispolitikkurin verður hildin

Leiðslan er av teirri fatan, at góðskustýringsskipanin í P/F Januar virkar effektivt, og at ásetingarnar um óheftni verða hildnar.

Mannagongdir og innaneftirlit minkað um váðan fyri, at feilir uppstanda, men kunnu ikki útiloka henda váða. Góðskueftirlitið hevur ikki staðfest týðandi veikleikar hesum viðvíkjandi.

## 8. Roknskaparupplýsingar, herí býtið av heildarumsetninginum á samsýning fyri roknskapar-grannskoðan, samsýning fyri aðrar váttanaruppgávur við vissu, skattaráðgeving og aðrar veitingar

| | |
|---|---|
| **Veitingar:** | |
| **Grannskoðan og aðrar váttanir við trygd** | **57%** |
| **Aðrar váttanir** | **17%** |
| **Ráðgeving** | **11%** |
| **Bókhald** | **12%** |
| **Aðrar veitingar** | **3%** |
| **Tilsamans** | **100%** |

P/F Januar hevur í undanfarna roknskaparárið loyst uppgávur fyri fylgjandi kundar, ið sambært grannskoðaralógini eru nágreinaðir sum løgfrøðisligar eindir, ið hava almennan áhuga:

**Virkir skrásett í keypsskála**

- Atlantic Petroleum P/F
- Bakkafrost P/F
- Banknordik P/F

**Virkir undirløgd Fíggjareftirlitinum ella Tryggingareftirlitinum**

- P/F Tryggingarfelagið Lív
- P/F Lív, Lívs- og pensiónstryggingarfelag
- P/F Trygd
- P/F NordikLív
- P/F Betri
- P/F Betri Banki

- P/F Betri Trygging
- P/F Betri Pensjón
- P/F Norðoya Sparikassi
- Eftirlønargrunnur Løntakaranna (Lívsverk)

Tórshavn, tann 20. desember 2021

Stjórn

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

Hans Laksá
statsaut. revisor

Nevnd

Heini Thomsen, formaður
statsaut. revisor

Fróði Sivertsen
statsaut. revisor

Christina á Bøgarði
statsaut. revisor

Jógvan Joensen
cand.merc.aud.

Jóhan Martin Jacobsen
KT-grannskoðari